

# Søkt verður eftir starvsfólki til bókhaldið

Arbeiði er fjølbroytt og mennandi. Starvið fevnir um allar tættir innan bókhald.

Talan er um eitt starv, har tú fært høvi til at arbeiða í einum spennandi og avbjóðandi umhvørvi, sum er í einari støðugari broyting, saman við dugnaligum og góðum starvsfeløgum.

**Førleiki**
Avgerandi er, at tú hevur áhuga í fyrisitingarligum viðurskiftum og royndir innan bókhald. Tað er umráðandi at viðkomandi er fyrikomandi og hevur hegni og hug at hjálpa til, har tað er neyðugt, tá á stendur.

Vit vænta at tú hevur lokið handilsskúlaprógv ella hevur royndir, ið eru samsvarandi við hesari útbúgving.

**Starvstreytir**
Løn, arbeiðstíð og onnur starvsviðurskifti eru eftir nærri avtalu við arbeiðsgevaran.

**Umsókn**
Um tú vilt vita meira um starvið ert tú vælkomin at ringja til Esmar Olsen, fíggjarleiðara á telefon 344071. Skrivlig umsókn við CV, prógvum og møguligum viðmælum verður at senda til eo@formula.fo ella við brævi til

Formula.fo
Att. Esmar Olsen
Stiðjagøta 5
Postsmoga 1078
FO-110 Tórshavn

Vit vóna at rætti umsøkjarin kann byrja í starvinum umleið 1. september 2006. Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 15 juli 2006.

**Formula.fo**

Formula.fo er privat KT-fyritøka við 70 fólkum í starvi, ið útvegar vørur og tænastu innanlendis og uttanlendis. Í fyrisitingini arbeiða í dag á Formula.fo 5 starvsfólk.

P/F Formula.fo, Stiðjagøta 5-11, Postrúm 1078, 110 Tórshavn, Tel 344000, Fax 344001, www.formula.fo

**formula.fo**

www.sansir.fo




# Reykjavík

Galdandi til 22/06 og frá 15/08 - 31/12-06



**Flúgv og búgv í Reykjavík**
3 nætur á Hotel Frón

Prísur fyri hvønn í dupultkamari. Eyka fyri einakamar kr. 1.436,-. Íroknað prísin er flogferð, gisting og øll avgjøld

Fríggjadag - mánadag

**3.365,-**

Galdandi til 22/06 og frá 15/08 - 31/12-06



**Flúgv og koyr**
B-bilur í 3 dagar

Prísur fyri 2 fólk og bil. Íroknað prísin er flogferð fyri 2 fólk, bilaleiga og øll avgjøld

Fríggjadag - mánadag

**5.305,-**



**Flúgv til Reykjavíkar**
Bara flogferð

Íroknað prísin eru øll avgjøld.
(Bilagt á atlantic.fo)

Prísir úr: **1.747,-**

www.sansir.fo

ATLANTIC AIRWAYS

Atlantic Airways ger tað stuttligari at liva í Føroyum | www.atlantic.fo



# Starvsfólk/pedagogur til Rókina

Á Rókini, sum er bústovnur undir Almannastovuni, eru tvey fulltíðarstørv leys at søkja til 1. august 2006 ella eftir nærri avtalu.

Rókin er landsstovnur fyri 5 børn/ung við m.a. skúla- og sosialum trupulleikum.

Vit vænta, at viðkomandi, ið sett verða, eru før fyri at arbeiða í sera tøttum samstarvi við bæði vaksin og børn og eru opin fyri nýggjum pedagogiskum avbjóðingum.

Tey, ið sett verða, skulu hava viðkomandi útbúgving/royndir og verða lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag.

Neyðugt er at hava koyrikort.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Súsan Johansen, leiðara, á tlf. 31 89 14 ella 21 30 44.

Umsóknarfreistin er 6. juli 2006.

Umsókn við avriti av prógvum, viðmælum, v.m. skal sendast til:
Almannastovan
Smyrilsvegur 20
Postboks 3096
110 Tórshavn.

almannastovan
www.almannastovan.fo

KREA.FO - TEL 47 80 80